tíðindablaðið sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Niclas Johannesen
**Yngd:** Jákup Mørk

**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir

**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820
**Telefax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** Sosialurin

# Ósvaraðir spurningar

## *Oddagrein*

SEINASTU tíðina hava samgongutingmenn úr Tjóðveldisflokkinum havt harðar atfinningar móti sínum egna landsstýri. Áhugavert hevur verið at fylgt hesum kjaki, men enn standa nógvir spurningar ósvaraðir. Seinast í røðini av atfinningum eru viðmerkingarnar frá tjóðveldistingmanni úr Eysturoynni, ið júst er farin í farloyvi. At løgtingið fær ov lítla tíð til at viðgera uppskot er ein vælkendur trupulleiki, og sum tað ljóðar á løgmanni, so verður hugt at hesum. Meira álvarsligar eru atfinningar frá sama tingmanni um, at landsstýrismaðurin í Vinnumálum segði alt annað enn sannleikan fyri løgtinginum í málinum um landsverkfrøðingin. Vit hava á hesum stað mangan havt hetta mál á lofti, og tí undra ákærurnar ikki okkum stórvegis. Tað, ið ein má undrast á, er, at samgongulimir siga seg vita, at landsstýrismaður hevur givið tinginum skeivar upplýsingar, og einki gera við tað. Í eitt nú Grønlandi fór ein landsstýrismaður frá í fjør, tí hann hevði givið tinginum skeivar upplýsingar. Tamilmálið í Danmark handlaði um, at Fólkatingið fekk skeivar upplýsingar. Eru tingmenn vitandi um skeivar upplýsingar, so er tað ein plikt at reisa misálit. At tað ikki hevur verið gjørt í hesum máli, var og er vónandi enn tekin um, at Løgtingið er nøgt við frágreiðing landsstýrismansins. Tá ein tinglimur nú sigur seg vita, at sannleikin ikki kom fram, so er hettar ein ákæra, ið ikki kann standa ósvarað. Hvat sigur løgmaður? Siga landsstýrismenn ikki sannleikan fyri tinginum?

EIN grundgeving hjá løgtingsliminum í farloyvi fyri, at ikki so nógv verður gjørt frá tingsins síðu viðvíkjandi ivasomum málum í landsstýrinum er, at misálit altíð merkir samgongu-slit í Føroyum. Skipanin við ábyrgd landsstýrismanna riggar ikki sum hon skal. Tá so er, so hendir tað óhepna, at trupulleikar altíð verða settir upp ímóti eitt nú fullveldismálinum, sum eysturoyartingmaðurin í farloyvi so greitt sigur tað í sínum viðmerkingum. Vit hava fyrr nevnt, at tað kundi sæð út sum næstan øll onnur mál hjá Tjóðveldisflokkinum mugu víkja fyri fullveldismálinum. Fáa vit fullveldi kemur alt uppá pláss av sær sjálvum! Nú sigur ein av tingmonnunum, ið hava myndað núverandi samgongu, at mál, ið eru „minni týdningarmikil“, verða set upp ímóti málsetninginum hjá samgonguni. Hetta kundi verið áhugavert at spurt formann Tjóðveldisfloksins og kanska eisini varaløgmann um, eisini sæð í ljósi av orðadráttinum um pensiónirnar. Er tað so, at lógin um ábyrgd landstýrismann ikki riggar og tí viðførir, at øll gerandisdagsmál verða vigaði ímóti eitt nú fullveldismálinum, vegna vandanum fyri samgongusliti, so er hettar ein trupulleiki, ið allir flokkar á tingi mugu tosa um. Tað er óheppið um allar tær góðu endamálsorðingarnar í stýriskipanarlógini bert eru tóm orð, og vit hava eitt Løgting, ið bert er ein avgreiðslustova hjá landstýrismanninum. Sum er hanga nógvir spurningar í leysari luft, ikki minst eftir seinastu atfinningarnar móti skipan okkara.

***Sosialurin***

Viðmerking:

# Pensionistar! — lygn! — mistak!



Hetta eru orðini tá ið ein opnar eina avís ella loftmiðlarnir, og eru tey øll vend ímóti okkara almanna og heilsumálaráðharra Helenu Dam á Neystabø.

Tá ið ein so hoyrir, hvussu illa okkara pensionistar verða viðfarnir av Helenu Dam á Neystabø, skilir ein væl, at teir royna at gera vart við seg av øllum alvi.

Kundi gott tonkt mær at vitað, hvussu Helena Dam á Neystabø hevði reagerað, um hon beint áðrenn jól hevði fingið at vita, at hon onga løn fekk fyrr enn millum jól og nýttár, og um hon var líka við at doyggja av svongd, so kundi hon fara á almannastovuna dagin eftir og fáa eitt oyra, væl vitandi, at almannastovan var stongd tann dagin. Men hvat ger tað, um okkara pensionistar ganga svangir eini jól — tað hevur Helena Dam á Neystabø ongantíð roynt.

Og hvat roynir Helena Dam á Neystabø so at forsvara seg við — jú eitt **mistak —** ein kundi spurt seg sjálvan, nær Helena Dam á Neystabø fer at gera okkurt annað enn mistøk? Hevur hetta lítla landið ráð at hava fólk at ráða yvir okkum, sum bert gera mistøk.

Hvat er so hetta mistakið? — jú eitt ár 2000 problem, sum als ikki er til — so lætt er tað, at billa okkum okkurt inn.

Hví lat Helena Dam á Neystabø ikki pensiónirnar útgjalda eftir teimum gomlu reglunum inntil tær nýggju vóru klárar og gjaldast kundi út eftir teimum uttan alt hatta humbukkið.

Í fimmarinum onsdagin, - sum eg haldi var undir lágmál, tí eingin slap fram at at spyrja, tí tvey, sum starvast innan almannaverkið tóku alla tíðina — var hetta bestilt - tosaði Helena Dam á Neystabø um, at pensionistarnir skuldi fáa regulera skattin, so teir ikki skuldi gjalda so nógv í skatt, og um løgtingið helt, at tað var í lagi, so var alt gott, men tað er tað bar slett ikki!!

Eg sá tvær uppgerðir hjá einum avlamispensionisti - eitt eftir gomlu skipani og eitt eftir níggju skipani — um ein leggur grunduppHæddina og avlamisviðbótina saman og samanber, so er pensiónin farin niður við ca. 300 kr eftir nýggju skipani, og tað hevur als einki við skatt at gera, hvar er so logikkurin — Helena Dam á Neystabø hevur jú jukað um, at pensionistarnir skulu fáa meira, og tá ið so samanumkemur fáa tey nógv minni. Tað var einaferð ein danskur sangari sum sang” der er noget galt i Danmark__” hetta kann ein vist róliga umseta til Føroyar.

Eisini hoyrdi eg í fimmaranum Helenu Dam á Neystabø brúka orðið **mistak** fleiri ferðir og ”eg veit ikki, eg skal kanna málið”, ”hetta er so innviklað”, trupult hjá mær at finna út av osv. Sjálvandi spyrja okkara pensionistar seg sjálvan, hvussu í allari víðu verð skulu vit finna út av skipanini, tá ið Helena Dam á Neystabø ikki klárar tað sjalv.

Í fjørð legði anstøðan fram uppskot í Løgtinginum um at hækka alla pensión við ca. 1300 kr/mánað. Hetta stemmaði Helena Dam á Neystabø og hennara samstarvsfelagar niður, tí sagt varð tá, at teir høvdu eitt nógv betur uppskot — ja gomorun, tað síggja vit nú!!!

Helena Dam á Neystabø dámar so væl at greiða fólki frá, at vit hava ikki ráð til at gjalda pensiónir, jú tað hava vit ráð til, tað er bert ein spurningur um prioritering, hví skulu pensionistarnir altíð koma upp í part niðast á breddanum á fíggjarlógini í staðin fyri **ovast.** Hví skulu teir altíð bíða eftir at hoyra frá tykkum, um tað nú var nakað oyra eftir til teirra, og um tað ikki varð, so skarva tit av pensiónunum, men aldrin av tykkara egnu løn.

Tað undrar meg, at man einki hoyrir frá løgmanni, nú Helena Dam á Neystabø í bløðunum verður skuldsett fyri at blaka um seg við lygnum og faktisk sjálv í útvarpinum dagin eftir sigur, at tað kann gott vera, at hon hevur logið.

Kann løgmaður bara lata sum einki, tá ið ein av hansara monnum verður skuldsettur fyri at lúgva?

**Heri Mortensen**
**Býráðslimur**
**Tvøroyri**



# Jólaskipið takkar

Jólaskipagrunnurin takkar øllum teimun, sum hjálptu við tiltakinum hesaferð. Tað er sera torført hjá okkum at nevna nøvn, tí vilja vit takka øllum tykkum, sum aftur hesaferð gjørdi tiltakið til eitt stórt upplivilsi. Túsund takk til øll tey sum fyrireikaðu.

Eina stóra takk til jólamenninar og manningina á Jólaskipinum og øllum teimum, sum gjørdu skrúðgonguna til nakað serligt. Túsund takk til øll tey, sum hjálptu við at seta dám á tiltakið við Atlantic.

Í ár gjørdu vit av at stovna ein grunn, sum skal verða knýttur at Jólaskipinum. Hesin grunnur skal stuðla vælgerandi endamálum í Norðoyggjum. Í ár var avgjørt, at peningurin sum inn kom, skuldi latast til tey avvarðandi hjá Pól Eyðfinni, sála.

Tey, sum hava ætlað at stuðlað júst hesum endamáli, men ikki hava havt tíð - ella hava gloymt tað, kunnu enn stuðla við at flyta pening í Norðoya Sparikassa ella Føroya Banka. Freistin er sett til fríggjadagin 14. januar.

At enda vilja vit senda eina hjartans takk til øll tey, sum við peningi stuðlaðu Jólaskipagrunninum. Túsund takk fyri - og gott nýggjár — øll somul.

**Jólaskipagrunnurin**



# Føroya Tele lækkar prísirnar

*Á tíðindafundi í gjár, kunnaði Andrass Róin, stjóri á Føroya Tela, fjølmiðlarnar um, hvørjar príslækkingar talan verður um, nú samráðingarnar við fjarskiftiseftirlitið eru lidnar*



*Andrass Róin: – Telefongjøldini í Føroyum verða nú millum tey lægstu í Europa*
***Mynd: Jens Kr. Vang***

JÁKUP MØRK

Seinastu árini hevur Føroya Tele við jøvnum millumbilum lækkað nýtslugjøldini á teleøkinum, og fríggjadagin varð so á tíðindafundi boðað frá, at frá 1. Februar lækka minuttakstirnir fyri telefonsamrøður munandi.

Júst hvørjar lækkingar talan er um, sæst á talvuni aðrastaðni a hesi síðu, men sum tað eisini framgongur av talvuni, so er ikki bara talan um lækkingar, við tað at uppringingar- og mánaðargjaldið hækka, tá nýggi prísirnir verða settir í gildi.

Í ávísum førum hevur verið funnist at, at Føroya Tele hevur havt somikið stór yvirskot seinastu tíðina, og røddir hava verið frammi um, at hetta er tekin um ov høg nýtslugjøld.

Andrass Róin greiddi á fundinum frá, at tað er sera týdningarmikið hjá felagnum at hava góð úrslit og gott gjaldføri. Bæði tí felagið í framtíðini helst má gera umfatandi íløgur, men eisin tí felagið framvegis hevur eina hampuliga stóra skuld, sum tó er minkað í stórum seinasta tíggjuáraskeiðið.

Hann greiddi tó eisini frá, at Føroya Tele sær tað sum eina samfelagsskyldu at lækka nýtsluprísirnar, tá hetta verður mett at vera fíggjarliga forsvarligt, soleiðis at brúkararnir fingu tænastuni til best møguligan prís.

### Lækka prísin og økja um søluna

Nýggja prísásetingin er úrslit av teimum samráðingum, sum Føroya Tele og Fjarskiftiseftirlitiði hava ført seinastu mánaðirnar, og fyri tey, sum skulu gjalda fyri nýtslu av telefonini má sigast, at hetta eru góð boð at fáa.

Andrass Róin greiddi eisini á tíðindafundinum frá, at verður talan um eina óbroytta nýtslu í 2000, sæð í mun til undanfarna ár, fara príslækkingarnar at merkja, at inntøkurnar hjá Føroya Tele fara at lækka við einum 15 mió.kr.

At hetta verður so, tykist tó alt annað enn sannlíkt, tí av øðrum tølum, sum vórðu framløgd fríggjadagin framgekk, at Føroya Tele væntandi fer at hava eina nettosølu í 2000 upp á 245 mió. kr., sum er uml. 30 mió. kr. hægri enn í undanfarna ári.

Orsøkin til hesa hækking er helst, at Føroya Tele væntar eina framhaldandi øking í felagum, serliga innan alnetið og fartelefonir. Talið av felagum á hesum økjum hevur verið støðugt hækkandi seinastu árini, og við verandi gongd er ivaleyst eisini hald í hesum metingum.

Tá farið var undir samráðingarnar var gjørt av, at grundarlagið undir nýggju prísunum skuldi vera teir prísir, sum eru galdandi í grannalondum okkara, t.v.s. fyrst og fremst norðanlondum.

Stjórin á Føroya Tele greiddi frá, at tá útgangsstøðið er tikið í grannalondum okkara, so hevur hetta viðført, at telefongjøldini í Føroyum nú vera millum tey lægstu í Europa. Sambært egnum útrokningum hjá Føroya Tele, sum síðani eru samanhildnar við útrokningar hjá »Tarifica Telecoms Pricing Bulletin», eru Føroyar nú á einum sjeynda plássi, tá tað ræður um at tosa bíliga í telefon. Viðmerkjast kann, at Tarifica Telecoms Pricing Bulletin hvønn mánað finnur fram til 10 tey bíligastu »telefonlondini« í Europa

### Hægst loyvdu prísir

Vert er tó at leggja til merkis, at teir prísir, sum Føroya Tele og Fjarskiftiseftirlitið eru komin ásamt um, eru hægst loyvdu prísir fyri telesamskifti í Føroyum, og tískil er einki til hindurs fyri, at lækkingarnar í prísunum vórðu enn størri, enn tær, sum framganga á hjáløgdu talvu.

Spurningur kann tí setast við, um tað er Føroya Tele ella Fjarskiftiseftirlitð, sum eiga heiðurin fyri lækkaðu prísirnir, sum framyvir fara at galda.

Andrass Róin viðgekk eisini, at teir undir samráðingunum fegnir vildu havt prísirnar á summum økjum, eitt nú alnetinum, at verið eitt sindur hægri, eins og teir royndu at fáa tað kostnaðarmiklu tíðin, t.v.s dagtakstirnir, at fevna um fleiri tímar.

Samanumtikið metti hann tó, at talan var um eina semju millum partarnar báðar, eins og hann metti, at hetta er ein loysn, sum báðir partar kunnu liva við.

| Prísbroytingar galdandi frá 1. februar 2000 | Verandi | 1/2-00 | Munur |
|---|---|---|---|
| Minuttgjald - fastnet dag | 0,70 | 0,38 | ÷45,7% |
| - nátt | 0,35 | 0,24 | ÷31,4% |
| Minuttgjald - GSM dag | 2,80 | 2,40 | ÷14,3% |
| - nátt | 1,40 | 1,40 | 0,0% |
| Minuttgjald - NMT dag | 1,90 | 1,70 | ÷10,5% |
| - nátt | 0,95 | 0,90 | ÷5,3% |
| Minuttgjald internet - dag | 0,30 | 0,30 | 0,0% |
| - nátt | 0,15 | 0,15 | 0,0% |
| Uppringingargjald | 0,30 | 0,40 | 33,3% |
| Mánaðargjald fastnet | 89,00 | 115,00 | 29,2% |
| Mánaðargjald ISDN | 135,00 | 175,00 | 29,6% |
| Mánaðargjald fartelefon | 89,00 | 115,00 | 29,2% |

# Kappingarførir prísir

*Jónsvein Joensen, leiðari á P/F Alnót, sigur at teir eru sera fegnir um nýggju prísásetingina, sum ger tað møguligt hjá teimum at taka kappingina við Føroya Tele upp*

JÁKUP MØRK

Í stuttari viðmerking til Sosialin sigur Jónsvein Joensen, at teir eru sera fegnir um, at Vinnumálastýrið, Fjarskiftiseftirlitið og Finnbogi Arge, landsstýrismaður, hava verið so avgjørdir í hesum máli.

Tað at hesir partar hava skorið ígjøgnum í málinum, hevur nú havt við sær, at vit í Føroyum eru komin niður á príslegu, sum er eitt úrslit av marknaðarkreftunum, og at prísirnir sostatt ikki eru úrslit av eini monopolstøðu, sum eitt einstakt virki hevur.

### Byrja í næstum

Í løtuni fara samráðingar fram millum Føroya Tele og Fjarskiftiseftirlitið um, hvørjar treytir skulu vera galdandi, tá aðrir útbjóðarar á marknaðinum skulu nýta føroyska fjarskiftisnetið, sum Føroya Tele er loyvishavari at.

Jónsvein Joensen sigur, at hesar samráðingar væntandi vera lidnar í hesum mánaði, og at P/F Alnót tá fer undir at bjóða viðskiftafólkum teletænastur innan øll øki, og ivast hann onga løtu í, at teir tá verða kappingarførir á øllum økjum.



***Mynd: Jens Kr. Vang***

